Semingsmaðurin:

# Landsstýrið kann ikki vænta at sleppa við eini null-loysn

**Tað er torført at gera eitt semingsuppskot, sum bara gongur øðrum partinum á møti, sigur Jógvan Amonsson, semingsmaður, sum hevur góðar vónir um at vit sleppa undan verkfalli**



*Jógvan Amonsson, semingsmaður sigur, at enn er vónleyst at siga, hvat fer at standa í einum møguligum semingsuppskoti*

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin,fo*

– Landsstýrið kann ikki vænta at sleppa við eini null – loysn.

Tað sigur Jógvan Amonsson, semingsmaður.

Teir báðir semingsmenninir, Jógvan Amonsson og Alfred Petersen, skulu nú royna at finna semju í sáttmálatrætuni ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Sáttmálin gekk út á midnátt fríggjakvøldið og tá ið tað ikki hevði eydnast pørtunum at finna semju, samdust teir í hvussu so er um at senda boð eftir semingsmonnunum.

Semingsmenninir skuldu hava fund við partarnar seinnapartin í gjár og eftir tann fundin skuldu teir leggja tað víðari semingstilgongdina til rættis.

Á fundinum skuldu teir fáa eina frágreiðing frá báðum pørtum um ynski og krøv og um, hvussu samráðingarnar stóðu, áðrenn teir ásannaðu, at teir ikki komu longur.

Jógvan Amonsson hevur tískil ikki tær stóru viðmerkingarnar, fyrrenn semingsmenninir hava tosað við partarnar og hava sett seg inn í støðuna.

Tað verður heldur ikki fyrrenn tá, at hann veit, hvussu nógv skilir partarnar og tískil eisini, hvussu torfør uppgáva, semingin verður.

Tað er ongin loyna, at tað fyrst og fremst er lønarspurningurin, sum skilir partarnar. Í tí sambandi hevur landsstýrið spælt út við, at tað vil helst hava eina null-loysn.

Men tað heldur semingsmaðurin ikki, at landsstýrið kann vænta.

– Tað verður torført at gera eitt semingsuppskot, sum bara gongur øðrum partinum á møti.

Men hvar ein nýggjur sáttmáli endar, heldur hann at tað er ómøguligt at siga. Hann staðfestir kortini, at hóast lønin hevur stóran týdning, eru tað eisini onnur viðurskifti, sum hava týdning í einum sáttmála. Men, hvat eitt semingsuppskot kemur at innibera, er vónleyst at siga.

Nú hevur privati arbeiðsmarknaðurin gjørt sáttmála í vár. Fer tað at vera grundarlagið undir einum sáttmála á almenna arbeiðsmarknaðinum eisini?

Tað var á privata arbeiðsmarknaðinum og hetta er almenni arbeiðsmarknaðurin. Men tað er skilligt, at allar broytingar í samfelagnum sum heild, hava týdning fyri einum sáttmála.

Semingsmaðurin hevur annars góðar vónir til, at tað fer at eydnast at finna semju, uttan at vit enn einaferð verða rakt av verkfalli.

### Langt ímillum partarnar

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum hevur heldur ikki so nógvar viðmerkingar, fyrrenn hann hevur tosað við semingsmenninar.

Men hann staðfestir, at tað er langt ímillum partarnar og tað tað komst ikki víðari, tí eru semingsmenninir boðsendir.

# Konufólkið á Postverkinum fingið búnar

**Konufólkið, sum arbeiðir inni á Posthúsunum kring landið, hava nú fingið nýggjan búnað**

PROFILERING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nokk so skjótt eftir at Postverk Føroya varð yvirtikið, fingu postboðini kring landið eyðkennisbúnar at vera í, táið tey vóru til arbeiðis.

Nú hava so eisini konufólkini, ið arbeiða inni á teimum ymsu posthúsunum fingið eyðkennisbúnar.

Enn hava mannfólkini, sum arbeiða inni á posthúsunum, ikki fingið búnar, men tað skilst at tað er ætlanin sum fráliður.

Á Posthúsinum á Tvøroyri siga tey, at tað hevur reiðiliga leingi verið í umbúna at útvega eyðkennisbúnar til starvsfólki og ein nevnd hevur arbeitt við málinum meiri og minni í fleiri ár.

Teir nýggju búnarnir eru útvegaðir ígjøgnum Abilit í Havn, sum hevur verið umboð og teir eru seymaðir í Svøríki.



*Hesar tríggjar á posthúsinum á Tvøroyri hava eisini fingið nýggjan búna. Frá vinstru eru tær Jórun Mortensen, Asta Mortensen og Sonja Joensen*

# Porkenningar tikið bygdarsavnið í nýtslu

**Eftir at hava arbeitt við málinum í nógv ár, hava Porkenningar nú tikið bygdarsavnið alment í nýtslu**



BYGDARSAVN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í nógv hava porkenningar arbeitt fyri at seta eitt bygdarsavn ástovn í bygdini.

Og nú er komið so langt, at bygdarsavnið varð tikið alment í nýtslu fríggjadagin.

Tað varð við almennari móttøku, har eini 100 fólk vóru komin saman at taka bygdarsavnið í nýtslu.

Bygdarsavnið heldur til í gamla skúlanum.

Magnus Tausen, formaður í Porkeris Fornminnafelag, sigur, at tá ið felagið varð storvnað í 1995, var tað fyrst og fremst við tí fyri eyga at varðveita gamla skúla, sum tá var í ógvuliga ringum standi.

Tað eydnaðist, men tað er eisini ógvuliga nógv arbeiðið algt í hann fyri at seta hann í prýðiligan stand. Innan er hann sermerktur, ikki minst tí at Johan Dam, vanliga nevndur Hannekiss, hevur æðramálað hann.

Porkenningar siga, at hetta mann vera eitt tað seinasta meistaraverkið undan hansara hondum.

Men síðani hevur ætlanin at varðveita skúlan eisini ment seg til at verða eitt veruligt bygdarsavn við ymsum lutum og tilfari, sum lýsir gerandisdagin í Porkeri fyrr í tíðini, bæði tímiliga og andaliga, til álvara og gaman og savnið má sigast at vera reiðiliga fjølbroytt, hóast hetta bara er byrjanin.

Magnus Hansen, sigur, at tey nú fara at finna útav, hvussu tað skal skipast at hava savnið opið.

Samstundis frætta tey í felagnum fegin frá fólki, sum hava søguligar og forvitnisligar lutir, sum tey vilja læna savninum ella sum tey vilja lata savnið hava í varðveitslu, so at tað kann útbyggjast og mennast.

Vit hava meiri um bygdarsavnið í Porkeri í Vikuskiftisblaðnum.

# Røringur komin í Hovstunnilin

HOVSTUNNILIN

Í Suðuroy gongur nú hvønn dag sjón fyri søgn, at dagurin nærkast alsamt, har farið verður undir at gera tunnilin ímillum Øravík og Hov.

Seinastu tíðina hevur verið arbeittvið at fyrireika arbeiðsplássið øravíkarmegin og tey, sum koyra ella ganga framvið, hava lagt til merkis, at tað er grivið omanav, har inntakið til tunnilin skal vera og eitt lítið hús er bygt við komandi tunnilsmunnan, har streymur er lagdur til arbeiðsplássið.

Og fríggjadagin komu so ymisk amboð í Suðuroynna, sum skulu brúkast í sjálvum tunnilsarbeiðnum.

Eitt stórt farmaskip hjá Samskip kom á Drelnes í fríggjadagin og har var bæði broyt og borivognur lossað í land. Tað vóru Farmaleiðir hjá Strandferðsluni, sum avgreiddi tann spurningin og amboðini standa nú á vognum á Drelnesi.

Tað, sum hevur ligið í kortunum, er, at arbeiðið skuldi byrja í hesum mánaðinum og at tað skal verða koyrandi ígjøgnum tunnilin á jólum 2007.



*Borivognurin,sum skal brúkast at bora Hovstunnilin við, er nú komin til Suðuroyar. Arbeiðið skal byrja í hesum mánaðaðinum og á jólum í 2007 skal verða koyrandi ígjøgnum hann*